**From:** Jákup Eyðfinn Kjærbo <jek@fmr.fo>
**Sent:** týsdagur, 30. januar 2024 09:22
**To:** Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
**Subject:** Fwd: LM-055/2023

*Uppskot til broyting í § 1, nr. 6:*

> § 20, stk. 1verður orðað soleiðis:
> "Skrásett virkir skulu seinast 1 mánað og 10 dagar aftaná endan av 1., 3. og 4. avgjaldstíðarskeiði boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini á søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna. Freistin fyri 2. avgjaldstíðarskeið er 24. august. Upphæddirnar skulu tilskilast í heilum krónum. Upplýsingarnar skal fráboðast umvegis talgildu sjálvgreiðsluna hjá TAKS. Landsstýrismaðurin ásetir reglur um, hvørjar upplýsingar skulu vera tilskilaðar í sambandi við avrokning av avgjaldinum."

## Viðmerkingar

Galdandi lóggáva ásetir ikki, hvussu skrásett virkir skulu boða TAKS frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini á søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4 í meirvirðisgjaldslógini, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

Fyri at gera umsitingina av avgjaldsuppgerðini einfaldari og meira tíðarhóskandi verður nágreinað, at skrásett virkir skulu nýta talgildu sjálvgreiðsluna hjá TAKS at boða frá støddini á útgangandi og inngangandi avgjaldinum í tíðarskeiðnum og støddini á søluni, sbrt. § 12, stk. 1-4, ið ikki skal roknast við í avgjaldsskyldugu søluna.

Frameftir verður bert møguligt at skáseta mvg uppgerð umvegis talgilda sjálvgreiðslu, sum í dag er Vinnugluggin. Eru upplýsingarnar ikki latnir umvegis talgildu sjálvgreiðsluna hjá TAKS, tá ásetta freistin er farin, verða m.a. reglurnar í kapitlunum IX, XII og XIII í meirvirðisgjaldslógini , undir hesum § 35, nýttar.

**Vinarliga/Kind regards,**

**Jákup Eyðfinn Kjærbo**

Løgfrøðiligur ráðgevi / Legal adviser
Office: +298 352020
Mobile: +298 552040
jek@fmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo